# PASS

**Passframleiðslan fyri alt landið fer fram í Danmark og er passavgreiðslutíðin umleið 2 til 3 vikur.**

**Vinaliga biðið tí um passið í góðari tíð.**

Umsókn um pass fæst á Fútaskrivstovuni, Smyrilsvegi 20, Tórshavn, á heimasíðuni www.politi.fo og á øllum politistøðunum uttanfyri Tórshavn.

Umsóknin kann latast inn við at venda sær persónliga til Fútaskrivstovuna í Tórshavn ella til eina av politistøðunum uttanfyri Tórshavn.

**Skjøl at hava við, tá pass verður umbiðið:**

- Gamla passið
- Dóps-, føði- ella navnaseðil og møguligt vígslubræv
- Nýggja passmynd stødd 35 x 45 mm.

**Passið skal gjaldast, tá tað verður umbiðið.**

| | |
|---|---|
| Persónar millum 18 ár og 67 ár | kr. 400,- |
| Persónar yngri enn 18 ár | kr. 115,- |
| Persónar, sum eru fyltir 67 ár | kr. 150,- |

Gjørt verður vart við, at eftir 1. oktober 2004 kunnu børn, sum eru undir 15 ár, ikki longur verða innskrivað í pass hjá foreldrum ella øðrum, og skulu tí hava egið pass.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Fútaskrivstovuna – tlf. 351448 – ella politistøðirnar.

**FØROYA LANDFÚTI**
tann 24. apríl 2007

Karen Marie Olesen

---

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# KUNNGERÐ UM RUDDING

Fuglafjarðar kommuna hevur sett sær fyri, at bilvrak, akfør, bingjur og lutir annars, sum uttan góðkenning frá kommununi rekast á almennum ella privatum økjum, skulu verða beind burtur og latin góðkendum móttakara.

Sambært § 1 í umhvørvislógini og § 1, stk. 4 í náttúrufriðingarlógini er ikki loyvt at lata órudd liggja og rekast á almennum ella privatum uttanduraøki, og í § 10 um burturkast stendur, at ikki er loyvt at lata ónýtilig akfør liggja og rekast í haga, fjøru, á sjógvi, fram við vegi ella aðrastaðni.

Í § 61 í ferðslulógini stendur, at løgreglan kann burturbeina ella selja skrásetingarskyldug akfør, sum standa á almennum vegi uttan nummarplátu.

Tey, sum eiga/hava frammanfyri nevndu akfør/lutir o.t. á almennum ella privatum øki, skulu beina hetta/hesar burtur skjótast gjørligt.

Verður hetta ikki gjørt innan 01. juni 2007, beinir kommunan tað burtur fyri eigarans rokning.

**FUGLAFJARÐAR KOMMUNA**
og
**SÝSLUMAÐURIN**

---

NES KOMMUNA
650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

ENDURLÝSING

# Barnagarðurin á Svangaskarði, Toftir

## Søkir eftir 5 námsfrøðingum

**Til stovuna Sóldøgg verður søkt eftir:**

- 1 námsfrøðingi at arbeiða 35-40 tímar um vikuna
- 1 námsfrøðingi at arbeiða 30 tímar um vikuna
- 1 námsfrøðingi at arbeiða 25 tímar um vikuna, tú kemur at hava ábyrgd av einum barni við serligum tørvi.

**Til stovuna Sólareyga verður søkt eftir:**

- 1 námsfrøðingi at arbeiða 35-40 tímar um vikuna í eitt ár.
  Starvið er fyri námsfrøðing í farloyvi.
- 1 námsfrøðingi at arbeiða 35-40 tímar um vikuna
  Tú kemur at hava ábyrgd av einum barni við autismu.

Um ongin námsfrøðingur søkir, verða hjálparfólk sett ístaðin.

Øll størvini eru til **at byrja 15. august 2007.**

Barnagarðurin er ætlaður 52 børnum, hevur tvær stovur, Sóldøgg og Sólareyga, har børnini hava sítt tilknýti.

Ein verkstað, Sólarglottin, har børnini gera ymiskt ítriv. Hvønn dag eru 7 børn úr hvørji stovu á verkstaðnum.

Vit arbeiða við »Trin for trin«.

Barnagarðurin liggur við stadionøkið á Svangaskarði, tætt við náttúruna og við nógvum møguleikum at vera úti.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**

- Dugir at seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- Hevur góð samstarvsevnir og kann taka ábyrgd
- Er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í skala 11-17, hjálparfólk í skala 1-5.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Ingrid Hansen, leiðara á tlf 448760/565021

**Umsóknir**
saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða Nes kommunu í hendi í seinasta lagi 29.05.2007 kl. 12.00.

**Nes Kommuna**
650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

---

# STARVSFÓLK TIL STATOIL ARGIR

Statoil Argir sóknast eftir dugnaligum starvsfólki til at arbeiða skiftandi vaktir. Uppgávurnar eru: Kassin og annað vanligt handils arbeiði.

Statoil Argir leggur stóran dent á at veita góða tænastu.

Ert tú fyrikomandi, smílandi, og eldri enn 17 ár? So er tað kanska júst tær vit leita eftir.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Róa Snorrason á tlf. 56 40 16.

Ljóðar hettar sum tú? Send so eina skrivliga umsókn til:

**Statoil Argir**
Traðargøta 41
FO-160 Argir

STATOIL

---

# Søkt verður eftir álítandi KVINNU

Smúkkuhjørnið Hotel Bólið søkir eftir álítandi fólki at byrja fulla ella hálva tíð.

**Vit vænta at tú**

- setur kundatænastu høgt
- ert fyrikomandi
- ert ágrýtin og álítandi
- ert klárur at lyfta tak, tá hetta krevst
- klárar alt vanligt telduarbeiði
- hevur kunnleika til føroyskt og enskt

Ætlanin er at viðkomandi skal byrja skjótast gjørligt. Trýggir teir fyrstu mánarnir vera royndartíð.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til felagið á tlf. 213303

**SMÚKKUHJØRNIÐ**
Niels Finsensgøta 51

---

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Lesið Sosialin - so eru tit við